# Heilsugóðir jólapakkar

**Fiskavirkið Norðfra í Norðdepli hevur lagt seg eftir at selja fiskavørur til bæði fyritøkur og privat húsarhald í Føroyum. Hetta byrjaði í mars og hevur veruliga tikið dyk á seg. Sum nakað heilt nýtt fara tey eisini skjótt at bjóða fyritøkum heilsugóðar jólapakkar**

FISKIVINNA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Fiskavirkið Norðfra í Norðdepli er farið undir eitt nýtt átak, har tey selja heilsugóðar pakkar við ymiskum fiskavørum*

**Norðdepil:**
Dygdargóðar vørur, pakkaðar í smáum eskjum. Eitt slag ella fleiri, um tú ynskir tað. Tænastan er í hásætinum, tí vøran verður koyrd til staðið, har tú ert.

Fiskavirkið Norðfra letur til at hava fingið fótin fyri seg við at selja heilsugóðar fiskavørur á heimamarknaðinum.

– Vit gera hetta, tí vit meta, at hetta er góður fiskur, og tað eru tað verri enn so øll í Føroyum, sum fáa í dag, sigur Ester Eysturskarð, ein av teimum trimum, sum stendur fyri virkinum í bygdini.

Tað byrjaði í smáum við, at Norðfra sendi teldupostar út til nógvar fyritøkur í Føroyum – serliga í høvuðsstaðnum. Á tann hátt komu fleiri og fleiri á teirra teldupostlista, og bíleggingarnar øktust bara.

Virkið gjørdi eisini nakað við lýsingar, og so við og við tók hetta dyk á seg.

Málið hjá virkinum er, at einaferð í framtíðini fara vørur frá teimum at standa á døgurðaborðum í øllum landinum.

### Jólapakki

Í mars mánaði í ár byrjaði Norðfra at selja eskjur við fløkum í. Hetta tóku fólk væl undir við, men í summar vóru tað heilt mong, sum skuldu niður til Danmarkar, ið vendu sær til virkið. Tey hildu, at góð fýra kilo bara av flaki var dekan ov nógv at hava í einari lítlari boks. Harvið kom hugskotið um ein blandaðan pakka.

– Og so var tað at vit hugsaðu, hví ikki royna tað sum jólapakkar, ið eitt nú fyritøkur kunnu geva teirra starvsfólkum, sigur Ester.
Ein jólapakki frá Norðfra fæst í trimum støddum. Lítil, miðal og lux pakki. Í tí lítla pakkanum fær keyparin 4,2 kg av fiskavørum, og við luxpakkanum fær keyparin 9,1 kg.

Í pakkunum eru toska- og hýsufløk, og raspað flak, kalvi, laksur, hummari, stoktar fiskakøkur og fiskasuppa. Hvussu nógv av hvørjum veldst um støddina av pakkanum. Somuleiðis er hummari ikki í tí minsta pakkanum.

Ester leggur dent á, at styrkin við vøruni hjá Norðfra er, at hon er heilsugóð, og tað verður ongantíð slakað við góðskuni. Prísin heldur hon eisini vera rímuligan.

Ein lítil jólapakki, sum er góð fýra kilo, kostar 343 krónur við MVG. Hinir báðir pakkarnir eru dýrari. Tað er fyri tað fyrsta tí, at hummari er í teimum, men so eisini tí, at har er nógv meira vøra í.

### Fiskasuppa

Nú hugskotið við at gera jólapakkar kom fram, var tað so heppið, at ein vøra, sum virkið hevur arbeitt við at ment í eini tvey ár, nú er klárt at koyra á marknaðin. Tað er ein fiskasuppa, sum bert krevur, at tann, ið ger matin, hevur 15 minuttir, nakað av vatni og eina grýtu.

Í eskjuni er ein pakki av serligum kryddaríum, ein pakki av rivnum gularøtum og ráum leyki, ein pakki við sundurskornum eplum og ein pakki við fiskabitum. Hetta alt saman gevur eina frálíka fiskasuppu, sum er løtt at gera og heilsugóð, greiðir Ester Eysturskarð frá.

Norðfra veitir fiskin sjálvt, men hitt sum er í eskjuni keypa tey frá einari útlendskari fyritøku.

– Tað er tí, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan setur so stór krøv, at tað hevði kravt umfatandi umleggingar her á virkinum, um vit skuldu gjørt tað sjálvi. Og fyri at tryggja okkum, at ongir trupulleikar skulu standast av tí, gjørdu vit eina avtalu við eina útlendska fyritøku, greiðir Ester frá.



*Seinasta skotið á stammuni hjá Norðfra er ein eskja við fiskasuppu, og tað einasta keyparanum tørvar er nakað at vatni og eina grýtu*

### Koyra út

Nógv fólk keypa frá Norðfra, og tey koyra keyptu vøruna ókeypis út hvønn gerandisdag í Klaksvík og aðrastaðni, har tað er landfast í norðoyggjum.

So koyra tey eisini út 14. hvønn dag til Eysturoy, Norðstreymoy, Havnar og Vágarnar – umframt at sent eisini verður til Suðuroynna, Sandoynna og hinar útoyggjarnar.

Ester sigur, at fólk keypa heilt nógv frá teimum, og enn hevur hon ikki hoyrt frá ónøgdum fólki.

– Vit leypa heilsøluliðið um til tess at kunna hava ein rímuligan prís, sigur hon.

Virkið hevur ein frystibil, sum koyrir vøruna út. Bilurin steðgar á sjey ymiskum støðum í høvuðsstaðnum, har fólk kunnu avheinta teirra vøru. Tað ber eisini til at fáa vøruna koyrda til dyrnar, men tað kostar 30 krónur eyka.

Øll tann ymiska vøran, sum er í pakkunum kemur ikki bara frá Norðfra. Virkið hevur tætt samstarv við Norðurfisk í Árnafirði, har tey keypa hummara og tað raspaða flakið frá. Alt hitt uttan laksurin kemur frá teimum sjálvum.

– Laksin keypa vit niðri, tí tað fæst ongin skivaður laksur í Føroyum fyri tíðina, sigur Ester og leggur afturat, at tað nærum er tragiskt, at tey mugu keypa laksin úr Danmark.

Øll kunnu keypa vørur frá virkinum í Norðdepli – annaðhvørt við at ringja til virkið ella umvegis teldupostin. Heimasíðan hjá teimum er at finna á www.nordfra.fo



*– Hugskotið um blandaðar fiskapakkar fingu vit í summar, og so hildu vit, at tað kundi verið ein frálíkur, heilsugóður jólapakki, sigur Ester Eysturskarð*

## Skeivt nummar

Í tíðindaskrivi í blaðnum í gjár um jólaborðhald á hotel Norð á Viðareiði stóð at tilmelding kann fara fram á tlf 457020. Hetta er ikki rætt. Tað rætta tlf nummarið skal vera 217020.

Undirritaða biður lesararnar og hoteleigaran halda mær tilgóðar.

**- sae -**



# Hesin verður ringur at taka

**Hvalbingar hava stungið ein sperðil, sum er heilar 7,40 metrar langur**

METSPERÐIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú flettingin er farin at halla, er greitt, at nú er eitt nýtt met sett í at stinga sperðil.

Og tað er eisini greitt, at hesin verður ringur at taka. Tað er Thorstein Thomsen í Hvalba, sum hevur stungið ein sperðil. og tá ið mátibandið varð lagt á hann, máldi hann heilar 7,40 metrar.

Tað er meiri enn ein metur longri enn gamla metið var. Tað metið tóku sandvíkingar í fjør, tá ið teir stungu ein sperðil upp á 6,09 metrar.

Teir skuldu fletta eina gamla ær, tá ið teir settu sær fyri at royna at seta nýtt met í at stinga sperðil.

Thorstein sigur, at tað gekk væl at venda sperðlinum og at stinga hann, men hann hevði hann í lunkaðum vatni alla tíðina fyri at hann ikki skuldi stirðna.

Hetta at royna at stinga langar sperðlar, er ein stuttlig kapping, sum tók seg upp, eftir at gamla føroyska metbókin boðaði frá einum metsperðli fyri nøkrum árum síðani.

Men síðani tá er longdin næstan tvífaldað.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Thorstein er við til at seta nýtt met. Í 1993 settu teir nýtt met við einum sperðli uppá 6,02 metur Í fjør slóu sandvíkingar tað metið við sjey sentimetrum, men tað hevur Thorstein nú aftur sligið so tað munar.

Men Thorstein lovar, at verða hetta metið sligið, ætlar hann sær at bjóða av einaferð afturat.



*Tá ið Thorstein legði mátibandið á sperðilin, vísti tað heilar 7,40 metrar*



*Sperðilin liggur samanringaður á einum flettingarborðið. Thorstein stendur aftast og skoðar verkið saman við Marin Kristinu, vm, Markusi og Báru*

## Veðrasýning í Vági í dag

**Í dag kl. 17 verður veðrasýning í Stóra Pakkhúsi í Vági. Aftaná verður hugnaløta fyri teimum, sum eru við**

VEÐRASÝNING
*Áki Bertholdsen*

Seinastu árini hevur tað rættiliga vundið upp á seg at hava veðrasýningar í Suðuroy. Og í dag verður veðrasýning sostatt í Vági.

Tað er fráboðað, at sýningin skal vera klokkan 14 í dag, men av tí at tað ikki liggur fyri hjá einum dómara at koma tá, er hon útsett til klokkan 17.

Sýningin verður í kjallaranum í Stóra Pakkhúsi.

Tað kostar 100 krónur og eitt fat av smurdum breyði at vera við. Tað skal skiljast soleiðis, at tá ið sýningin er liðug, hittast allir luttakararnir- altso ikki veðrarnir, men tey, sum hava veðrar á sýningini, til eina hugnaløtu í miðhæddini í Stóra Pakkhúsi, har eisini steypini verða handað.

Og tað eru fleiri steyp at vinna. Eitt steyp verður latið fyri hagalomb, eitt fyri traðarlomd og fremmand lomb, Eitt steyp verður latið fyri veturgamlar veðrar og eitt fyri eldri veðrar.

Tað plagar at verða einir 40-50 seyðir við á sýningini í Vági.

# Musikkskúlin stóran týdning

RÁÐSTEVNA

Í gjár setti Jógvan á Lakjuni musikskúlaráðstevnu í Norðurlandahúsinum. Hann segði m.a. -Kære deltagere til denne konference angående musikskoler og forhold angående musikundervisning i Norden ! Det er mig en stor glæde at åbne denne konference, som bliver holdt i forbindelse med, at musikskoleordningen på Færøerne er 20 år i år.

Jeg ønsker at byde jer alle velkommen her i Nordens Hus, - og vores tilrejsende nordiske venner fra Island, Norge og Danmark ønsker jeg samtidig hjertelig velkommen til Færøerne.

I programmet for de to dage ser vi, at man har valgt at sætte fokus på emner, der skal belyse både faglige og strukturelle aspekter fra de forskellige nordiske lande.

Foredragene omhandler mange forskellige emner, musik- og kulturskolearbejde, fagforeningsabejde, kombinationsansættelser i musikskole, folkeskole og gymnasium, elevbetaling, undervisning i nyere musik, sangen i folkeskolen - samt færøske musikskoleforhold.

Foredragsholdere er nøglepersoner i de respektive lande og vi har derfor forventninger om en enestående mulighed for at høre hvilke erfaringer man har gjort sig i de forskellige lande.

I forlængelse af foredragene er der afsat tid til diskussion, og vi håber at spørgelysten bliver stor, så man kan få belyst emnerne og sætte dem i perspektiv - i forhold til ens eget land.

Selv om landenes størrelsesforhold er så vidt forskellige fra hinanden, så er de begreber, vi her opererer med, generelle og universelle. Det handler om værdier, opvækst og kvalificeret undervisning.

Musikskolen på Færøerne har haft meget stor betydning, og jeg tør sige, at den især i de senere år har oplevet stor velvilje fra politisk side og en bred opbakning fra befolkningen.

Den voksende interesse blandt folk skyldes delvis, at musikskolen er gjort mere synlig i nærsamfundet, men også at man har indtryk af, at den fungerer, og at den giver kompetent undervisning.

Dette til trods bliver Musikskoleloven i øjeblikket revideret, og der er nedsat en arbejdsgruppe, der skal komme med forslag til en ny lov – som så skal lægges frem i Lagtinget.

I arbejdsgruppen, der skal revidere loven er alle implicerede parter repræsentæret, Undervisningsministeriet, de to kommune-sammenslutninger på Færøerne, musiklærerfagforbundet - samt landstyrets musikskoleleder, som er formand for arbejdsudvalget.

Som minister med ansvar for området, er det naturligvis i min interesse, at musikskoleområdet får den ansvarlige politiske behandling, som er nødvendig.

Det har stor betydning, at disse værdier fortsat får gode vækstbetingelser. Den fremtidige struktur indenfor musikskoleområdet må indrettes således, at den også er bæredygtig.

Mig bekendt går udvilklingen i vore nabolande i lovmæssig henseende således, at det bliver obligatorisk for kommuner at opretholde en musikskole.

Dette og mange andre spørgsmål vil uden tvivl blive diskuteret på konferencen, og jeg skal ikke komme med noget politisk svar – her på forhånd.

Det er glædeligt, at man på musikkens område har indgået et samarbejde mellem folkeskolens sanglærerforening og musikskolens lærerforening.

Jeg vil takke Føroya Musikklærarafelag og Sanglærarafelag Føroya for dette initiativ, og ønsker jer alle sammen en god konference og god arbejdslyst - og åbner med disse ord denne nordiske konference om musikundervisning.



*Jógvan á Lakjuni setti ráðstevnu um tónleik*

*Mynd Jens K. Vang*